## Norskir bóndur ótryggir

Í Noregi eru svínabóndurnir ótryggir, nú myndugleikarnir hava staðfest svínakrím á einum stórum svínagarði. Í Noregi eins og aðrastaðni hava myndugleikarnir gjørt av at koppseta fólk ímóti H1N1 ella svínakrími, og at tað eru sjúk fólk, kvinnur við barn og starvsfólk í heilsuverkinum, sum skulu koppsetast fyrst. Tað góðtaka teir norsku svínabóndurnir, men siga, at teir eiga at koma næst í røðini. Tað er staðfest, at tað var eitt fólk við H1N1, sum smittaði svínini, og tað er ikki hent áður, sigur norska matvørueftirlitið.



## Kina hevnir fund

Kinesiska leiðslan mótmælti, tá Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, valdi at hitta andaliga leiðaran hjá tibetanum, Dalai Lama, tíðliga í summar, og síðani hevur Danmark kent sviðan av gestablídni forsætisráðharrans. Tað skrivar Politiken. Blaðið skrivar, at fýra danskar ráðharravitjanir í Kina eru avlýstar ella útsettar, og fundurin í mai hevur eisini havt avleiðingar fyri danskt vinnulív. Politiken vísir á, at kinesiska leiðslan hevur sagt danska uttanríkisráðnum, at fundurin millum Løkke og Lama hevur verið sera órógvandi fyri viðurskiftini landanna millum. Eingin í stjórnini vil siga nakað við blaðið um málið.

# Varpaðu ljós á byggilistina

**Altjóða arkitektadagurin fríggjadagin eydnaðist so væl, at tiltakið verður endurtikið, sigur Heidi H. Poulsen, ein av fyriskiparunum. Hon kundi hugsað sær, at aðrir felagsskapir koma við næsta ár**



*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, setti Arkitektadagindagin. Við síðuna av Helenu stendur Heidi Poulsen úr arbeiðsbólkinum Kveika hjá Arkitektafelagnum, sum hevur skipað fyri Arkitekturdegnum. Haraftrat er Svend Sivertsen, formaður í felagnum á myndini*
*Mynd: Tórálvur Weihe*

BYGGILIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Heidi H. Poulsen, arkitektur er ovfarin av, so væl sum tiltakið hjá Arkitektafelag Føroya seinasta fríggjdag eydnaðist.

Væl av fólki var og vitjaði stóru framsýningina, sum limirnir høvdu á Reinsarínum við projektum, tekningum og fotomyndum, og framsýningin hjá børnunum var somuleiðis væl vitjað.

Altjóða arkitektadagurin varð á fyrsta sinni hildin í 1985, men hetta er fyrstu ferð, at dagur er hildin í Føroyum eisini.

- Tað hevur so stóran týdning, at vit stíga fram og vísa, hvat góður arkitekttur er í staðin fyri bara at seita og grenja, sigur Heidi H. Poulsen. Hon er í arbeiðsbólkinum Kveiki hjá felagnum. Kveiki fyriskipar tiltøk hjá felagnum.

### Nógv prát

Hon heldur tað enn vera ov tíðliga at siga, at um tiltakið hjá føroysku arkitektunum fær nakra ávirkan. Tað fer tíðin at vísa. Men fólk, sum vitjaðu, vóru fegin, og tosa varð um, at ikki nóg nógv hevur verið frammi um føroyskan arktektur.

Í seinastu viku gjørdi felagið nógv, og afturljóðini hava verið fleiri í sambandi við tær greinir, sum føroyskir arkitektar ta vikuna høvdu í bløðunum um føroyska byggilist.

Tað vóru ikki bara fólk í byggivinnuni og tey tilvitandi um arkitektur, ið vitjaðu. Fleiri fólk duttu av tilvild inn á gólvið, og dúglig orðaskifti vóru um byggilist, umvæling av gomlum húsum, um góðsku o.a. Burðardygd var eisini eitt av orðum, sum brúkt varð í sambandi við framsýningina.

- Við at hava eitt slíkt tiltak koma vit í samband við nógv fólk, sum vit annars ikki koma í samband við, og tað er í sær sjálvum gott, sigur Heidi H. Poulsen.

### Steðga á

Hennara vón er, at føroyskur arkitektur nú fær betri tíðir. Tey seinastu árini hevur verið stór ferð á byggingini. Nógv bygging hevur verið illa umhugsað, prísirnir hava verið høgir, og roynt hevur verið at skarvað av.

- Nú hava vit stundir at steðga á, og hetta fer vónandi at tæna arkitekturinum, sigur Heidi H. Poulsen.

Hon sigur tað vera púra vits, at tiltakið verður endurtikið, og við at hava roynt í ár, skuldi felagið verur betur fyrireikað til næstu ferð.

Heidi H. Poulsen kundi hugsað sær, at altjóða arkitektadagurin í Føroyum næsta ár verður útbygdur, golsieðis at aðrir felagsskapir koma við. Eitt hugskot kundi verið, at MBF luttók við framsýning um atkomumøguleikar, og søvnini kundu eisini havt framsýningar. Møguleikarnir eru nógvir.

# Lars Løkke Rasmussen hjálparmaður hjá Astu

Asta Jacobsen man vera ein tann fremsta býarmýndin í Havn. Síðan 1948 hevur hon havt kioskina á Vaglinum. Her hevur hon kunnað eygleitt gongdina i býnum og landinum øll hesi ár.

Asta er jú ein tann nærmasti grannin hjá løgtinginum, so her er løgtingsmenn komnir framvið í hundraðtali øll hesi árini og hava keypt bomm, bløð og annað frá Astu. Hon er eitt sindur forvitin og spyr altíð eftir, um teir vita nakað nýtt. Asta fær tað at vita, sum er vert at vita. Hon sigur eisini løgtingsmonnum sína meining um støðuna. Hon kann sigast at vera okkara mest royndi politiski eygleiðari.

Kioskin hjá Astu er kanska ikki tann mest framkomna í landinum, men hon er tann mest sjarmerandi. Asta er einsamøll um kioskina, men til okkurt tørvar henni tá hjálp. Ein lúka verður sett fyri sølugluggan, tá ið kioskin er lukkað. Hana klárar Asta sjálv at taka niður, tá ið hon letur upp. Men at fáa hana fyri aftur, tá ið hon letur aftur, má Asta hava onkran at hjálpa sær.

Tað plagar heldur ikki at standa á. Hon preiar okkurt mannfólk, sum kemur framvið, og eingin sýtir henni ta bøn at hjálpa henni at lyfta lúkuna upp.

Ein kvøldið eftir ólavsøku var tó sera tómt í býnum. Men einaferð sær Asta eitt par koma gangandi niðan eftir Niels Finsensgøtu. Asta rópar eftir teimum og spyr mannin, um hann ikki kann hjálpa henni við lúkuni. Hann var fryntligur og hjálpsamur, og tað var skjótt, at lúkan var komin upp.



*Asta er okkara mest royndi politiski eygleiðari*



*Kioskin hjá Astu er býarmynd*

Asta takkar so hjartaliga, og nú sær hon, at tann hjálpsami maðurin var eingin annar enn danski forsætismálaráðharrin Lars Løkke Rasmussen, sum jú var í Føroyum í summar í samband við ein fund hjá Vinstraflokkinum. Hann var so farin ein kvøldartúr saman við Sólrun, síni føroysku konu, og endaði kvøldið í tænastu hjá Astu!

So uttan mun til, hvat politiskur andstøðumenn siga um Lars, so kann Asta bert rósa honum!

**ó.**